# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Margit Thomsen 80 ár

22.apríl verður Margit Thomsen í Havn 80 ár. Margit er fødd og uppvaksin í Havn, dóttir Jens Petur Egholm, skipara, vanliga nevndur Dess, úr Havn og Fridu fødd Djurhuus úr Haldarsvík. Margit átti tveir brøður, Jóan Hendrik, sum doyði í 2001, og sum búði í Esbjerg, og Elias, sum býr í Havn.

Sum ung fór Margit á skrivstovuna hjá Valdemar Lützen at arbeiða. Har var hon í 6 ár, til hon fór at læra til sjúkrasystur.

Tað at verða sjúkrasystir kom at verða hennara lívsstarv. Eftir lokna útbúgving royndi hon seg sum sjúkrasystir bæði í Danmark og Noreg, og heimafturkomin fór hon á Landssjúkrahúsið at arbeiða har hon var til hon fór úr starvið fyri aldur í 1995.



Margit var formaður í Dans Sygepleje Råd, Føroya Deild árini 1969 til 73, og hon hevur eisini verið nevndarlimur í Havnar Sjúkrakassa.

Í 1958 giftist hon við Tummas Paula Thomsen, skipsførara, úr Nólsoy, og tey bæði búsettust í Havn. Pauli andaðist í 1991. Tey fingu tveir synir, Eyðfinn, sum er giftur við Margretu Dalsgaard úr Havn, tey búgva í Havn í barnaheiminum hjá Margit, og Dess, sum er giftur við Kristinu Hoydal. Tey búgva í Stavanger í Noregi. Ommubørnini eru 5 í tali, 3 gentur og 2 dreingir.

Margit er væl kend mynd í Havnar gøtum, og henni dámar sera væl at práta við fólk.

Føðingardagurin verður hildin sunnudagin 27. apríl millum kl. 11 og 15 í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, har vinir og kenningar eru vælkomnir at heilsa upp á Margit.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Torvald Joensen**, Norðagøta, fer úr ellisheiminum í Runavík mánakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Gøtu Kirkju týsdagin kl. 14. Tey, sum vilja senda blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Gøtu kirkju. Konta í peningastovnunum.

## Takkarkvøða

Eina hjartans tøkk til øll tey, sum við vitjan, gávum, telegrammum og uppringingum gjørdu okkum 80 ára dagarnar so hugnaligar. Rigmor 26. august 2007 og Tórhallur tann 8. februar 2008.

**Heilsan**
**Rigmor og Tórhallur**

# Minningarorð

Sunnukvøldið 6. apríl 2008 andaðist Ruth Olsen í Havn, 70 ára gomul.

Ruth var borin í heim 19. juni 1937 í Brekkuni í Klaksvík, dóttir Annu og Jógvan Isaksen. Mamman var ættað úr Uppistovu á Trøllanesi, og pápin var úr Beiti í Lorvík. Tey vóru 7 systkin, og Ruth var nummar 5 í røðini. Elst var Bodil, so Korintha, síðani Jógvan og so Suffía. Tey yngru vóru Sigvør og Finnbogi. Nú eru bara tær tríggjar systrarnar eftir Korintha og Fía, sum báðar búgva í Klaksvík, og so Sigvør, sum býr á Møn í Danmark.

Tá Ruth var 11 ára gomul, doyði pápin brádliga bert 51 ára gamal, og mamman sat einsamøll eftir við fleiri smáum børnum, tað yngsta var bara 5 ár, tær báðar elstu døturnar vóru tá giftar. Jógvan hevði nøkur ár frammanundan keypt Atlantsfarið saman við Kjølbro. Tá ið Jógvan doyði, yvirtók Anna partin hjá Kjølbro og reiddi í fleiri ár sjálv skipið út.

Tá ið Ruth var liðug við skúlan, fór hon til Danmarkar á húsarhaldsskúla í Haslev.

Aftur í Klaksvík hitti hon Regin Olsen úr Havn, sonur Napoleon (Bona) og Armgarð. Hann var leiðari í Norðoya Banka, sum var Norðoya deildin av Sjóvinnubankanum. Tey giftust 8. november 1958 og búsettust í Klaksvík

Í 1964 fluttu tey til Havnar og bygdu sær hús á Sólteigi, og har hava tey búð síðani.

Meðan børnini vóru smá, var hon, sum flestar konur tá í tíðini, heima. Seinni fór hon at arbeiða á Vøggustovuni á Lützenstrøð, ið Nansy Bjørklund stóð fyri. Hon hevði ábyrgdina av køkinum. Ruth dámdi væl at arbeiða við børnum, og dugdi sera væl við børnum. Hon tosaði tá um at læra víðari til pedagog. Men umstøðurnar vóru ikki tær somu tá, sum tær eru í dag, at læra, tá ið ein er vorðin tilkomin.

Seinni, tá ið hon aftur hevði verið heima í nøkur ár, heitti Óluva Húsgarð á hana, um hon ikki kundi koma og hjálpa til í Heimavirkinum. Tað førdi við sær, at hon arbeiddi fast á heimavirkinum í fleiri ár.

Ruth hevði eitt lætt lyndi, og hon dugdi væl at tosa við fólk. Hon hevði tey vælsignaðu evni at fáa øll at føla seg væl. Hon var sera gestablíð, visti nógv um familju, og til hon gjørdist sjúk, fylgdi hon væl við øllum, sum fór fram í samfelagnum, og



hóast hon nú hevði búð í Havnini í 44 ár, so hevði hon serligan áhuga fyri Klaksvíkini. Tað er mangur klaksvíkingur, sum hevur sitið væl inni hjá henni og Regin.

Ruth og Regin fingu 4 børn. Fyrsta barnið, ein dóttir, doyði undir føðingini í 1959. Síðani er tað Jákup, hann er giftur við Dorrit á Fløtum og tey búgva í Havn. Annika er gift við Niels Winther Poulsen, tey búgva í Hoyvík og Armgarð er gift við Oyvindi Brimnes. Tey búgva á Argjum. Ommubørnini eru 9 í tali, 6 gentur og 3 dreingir.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, hjálpsemi og á ein hvønn hátt hjálptu til, tá mamma, omma, langomma og vermamma okkara

**Brynhild Maria Johannessen**

doyði og varð jarðað.
Somuleiðis takka vit fyri kransar, blómur og heilsanir.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið í Handarustovu á Lágargarði, fyri at tit vóru so góð við mammu okkara ta tíðina, hon búði har, og Hanus Simonsen, prest, fyri tey vøkru orð í kirkjuni.

*Familjunnar vegna*
**Niels Símun og Álvhild**

**Dagurin**
**22. apríl. Cajus.** Pávi, sum doyði í árinum 296.
Fríðrikur Petersen varð føddur hendan dagin í 1853

Sosialurin -har tað hendir